Leys størv í Tórshavnar kommunu

SLØKKILIÐSFÓLK

Søkt verður eftir parttíðar sløkkiliðsfólki til sløkkiliðið hjá Tórshavnar kommunu.

HØVUÐSUPPGÁVUR
Uppgávurnar eru sera fjølbroyttar, m.a. alt vanligt sløkkiliðsarbeiði, brunafyribyrgjandi uppgávur og bjargingaruppgávur.

Roknast má við arbeiði í ólagaligari arbeiðstíð.

FØRLEIKAKRØV
Ynskiligt er at tú hevur handverkaraútbúgving sum td. bilmekanikari, maskinsmiður, timburmaður ella líknandi.

Roknað verður við, at tú innan 3 mðr. hevur førarabræv til akfar yvir 3.500 kg.

ANNAÐ
Neyðugt er, at umsøkjari er væl fyri í føroyskum, bæði skrivliga og málsliga.

Umsøkjari má kunna vera á støðini innan 5 minuttir.

Eisini skulu umsøkjarar, eftir umbøn, kunna útvega reina revsiváttan frá politinum og nøktandi heilsuváttan fyri roykkavarar.

SETANARVIÐURSKIFTI
Starvið verður sett sum skjótast, og lønt sambært avtalu.

MEIRA FÆST AT VITA
um starvið við at venda sær til Kartna Jacobsen, sløkkiliðsstjóra, ella Hans Dávid Hansen, vara-sløkkiliðsstjóra, á telefon 302100.

UMSÓKN
Umsókn, merkt „Umsókn parttíðar sløkkiliðfólk“, saman við viðmælum, og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar Kommunu, postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 4. november 2013. kl. 12.00.

PEDAGOGUR

Tórshavnar kommuna søkir vegna Dagstovnin Lítlaskóg eftir einum pedagogi til vøggustovu at arbeiða 35 tímar um vikuna at byrja 2. januar 2014 ella eftir nærri avtalu.

Um pedagogur ikki søkir kann hjálparfólk verða sett í tíðaravmarkað starv.

SETANARVIÐURSKIFTI
Starvið verður sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

UMSÓKN
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Lítlaskógi, Djóni í Geilsgøta 51, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 4. november 2013.

MEIRI FÆST AT VITA
um starvið við at venda sær til Beintu Dalbø, stovnsleiðara, telefon 219135.

PEDAGOGUR

Tórshavnar Kommuna søkir vegna Dagstovnin í Øksnagerði eftir einum pedagogi, fyri pedagog í barsilsfarloyvi, til vøggustovu at arbeiða 30-35 tímar um vikuna at byrja 1. desember 2013 ella eftir nærri avtalu. Starvið er tíðaravmarkað fram til 31. juli 2014.

Um pedagogur ikki søkir kann hjálparfólk verða sett í tíðaravmarkað starv.

SETANARVIÐURSKIFTI
Sarvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

UMSÓKN
Saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Dagstovninum í Øksnagerði, Øksnagerð 1, 100 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 4. november 2013.

MEIRI FÆST AT VITA
Við at venda sær til Anju Djurhuus, leiðara á telefon 302260 ella 219959, ella við at hyggja á www.oksnagerdi.fo.

PEDAGOGAR

Tórshavnar kommuna søkir vegna Býlingshúsið Vesturi á Flat eftir tveimum pedagogum at arbeiða 35 tímar um vikuna at byrja skjótast tilber.

Um ongin pedagogur søkir kann hjálparfólk verða sett í tíðaravmarkað starv.

SETUNARVIÐURSKIFTI
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

UMSÓKNIR
Umsókn saman við prógvi, CV og viðmælum skal vera Býlingshúsinum Vesturi á Flat, Per Mohrsgøta 11, 188 Hoyvík, í hendi í seinasta lagi hósdagin 31. oktober 2013.

MEIRA FÆST AT VITA
Um starvini við at venda sær til Turið Horn, stovnsleiðara, á telefon 222905. Heimasíða okkara er www.flat.fo.

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

LÝSINGARTORGIÐ

Alt til akfør

Dekk til sølu
Góð vetrardekk "First Stop" 185 / 65 R14 á aluminiums felgum til Mitsubishi Carisma, 4 hol, -frástøða 114 mm. Koyrt umleið 700 km. Nýprísur fyri dekk í fjør kr. 4.300 til sølu fyri kr. 2.300.
216576

Amboð

Kombinerað snikkaramaskina
Kombinerað snikkaramaskina,við rulliborði,til sølu. *585585*

Arbeiði

Húshjálp ynskist
Húshjálp Røsk og álítandi húshjálp ynskist í Havn uml. 5 tímar um vikuna.
Bil. mrk. 111

Bátasmíð
Eg átakið mær at smíða og umvæla føroyskar bátar og kappróðrarbátar. Ring og vit kunnu tosa nærri. Bátasmiðurin Terji
585585

SETHÚSATEKNINGAR NÝTAST IKKI AT VERA DÝRAR
TEKNIGAR TIL SETHÚS,BILHÚS,UMBYGGING, INNRÆTTING TIL SERLIGAN TØRV, OG TEKNINGAR TIL BYGGILOYVI
ELISABETH MORTENSEN TLF,517244

Býli í Føroyum

Kamar til leigu
Í Vesturbhýnum tætt við Vesturkirkjuna er kamar til leigu. Atgongd til køk, bað og vask. Møguleiki fyri breiðbandi.
262394

Kamar til leigu
Kamar til leigu í Havn, til friðalig fólk. Liggur 5 min. fra mitbýin og Sms. Har er felags køk, wc og vaskirúm.
260196

Handilshølið til leigu
á Stoffalágvegnum 33
314301

Íbúð ynskist til leigu
Par við 2 børnum ynskja, at leiga eina íbúð í Tórshavn ella í Hoyvík. Skal helst hava 3 kømur. Men alt hevur áhuga.
590980

Hús til leigu
Eldri hús á Toftum, við Rætt 4, til leigu. Áhugaði kunnu ringja til
749760/747760

Íbúð ynskist til leigu
Par ynskir íbúð til leigu á Argjum, Havn ella í Hoyvík. Stødd: Køkur, stova, kamar, baðirúm og gongd. Roykja ikki.
Tlf 519056

Kamar til leigu.
við atgongd til køk, bað, vaskimaskinu, turkitrumlu, fristiboks og tráleyst internetbreiðband. Nær við Læraraskúlan og Sjómaskúlan.
221158

Lutaseðlar

Seyðaseðil NSÍ 2013
Hava vunnið sodavatn 39 41 725 727 1002 1004 2142 2144 4080 4082 4554 4556 5516 5518 6119 6121 5683 5685 5854 5856
Ring til Stig Davidsen, tlf. 598813

Seyðaseðil NSÍ 2013
Hava vunnið krov: 1. 5517 2. 4655 3. 40 4. 726 5. 4081 6. 6120 7. 5855 8. 2143 9. 1003 10. 4555 11. 5684 NSÍ takkar fyri stuðulin
Ring til Stig Davidsen, tlf. 598813

Ymiskt

Loppumarknaður 26. oktober
Kom og ger kvetti! Loppumarknaður í Havn leygardagin 26. oktober kl. 10-15 verður loppumarknaður í Stiðjagøti í Havn. Vilt tú stuðla okkum við at lata onkran góðan lut ring. 216828/319630 Reyði Krossur Føroya
216828-319630

Bogaskjóting
Bogaskjótifelagið Tambar byrjar vetrarhálvárið 2013/14 tann 20. oktobur, fyri vaksin kl 19 til 21 og fyri ung 10 til 15 ár tann 23. oktobur kl 18 til 21, uppá spantiloftinum hjá P/F Mest. Nevndin
Tlf 220616